# Vel skynsemi. Vel framburð. Vel Sambandsflokkin.



# Ein kommuna í fremstu røð

Vit bjóða okkum at umboða teg og hugsanir tínar í býráðnum. Mál okkara er at reka kommununa skynsamt og við stórum framburði. Kommunan er til fyri fólkið, og ikki øvugt.

Her skal vera lætt og gott at seta búgv, at stovna familju, at ferðast úr Hesti til Kollafjarðar, at gerast gamal, at fara til handils, at ganga til ítrótt, at reka vinnu, at ganga í skúla.

Stutt sagt. Her skal vera gott at liva.

Tórshavnar Kommuna er ein góð kommuna, men nú skal hon vera ein kommuna í fremstu røð.

**Vit eru til reiðar at taka róðrið.**

Les meira um okkara kjarnuøki á samband.fo




# Okkara 4 kjarnuøki

### Grundleggjandi kommunalar tænastur

Kloakkir skulu sjálvandi førast út á streymasjógv. Vegirnir skulu sjálvandi vera frálíkir at koyra á.

Stovnsbygningar skulu sjálvandi vera í góðum standi. Grundstykki skulu sjálvandi útvegast teimum ungu fyrstuferðskeyparunum.

Parkeringsmøguleikarnir skulu sjálvandi víðarimennast og skipast. Frítíðar- og ítróttartilboðini skulu sjálvandi hava bestu karmarnar, til at menna okkara ungu í øllum leikum.

Sambandsflokkurin kennir tørvin hjá borgarunum, og hesar tænastur eru sjálvsagdar í einari nútímans kommunu. Og Tórshavnar Kommuna er ein nútímans kommuna.

### Umhvørvi og náttúra

Vit vilja hava eina kommunu, har fólk og náttúra liva saman og stimbra hvønn annan.

Alt, vit fremja í kommununi, skal hava umhvørvisligt atlit, tí vit vilja gera okkara til at tálma veðurlagsbroytingunum, og áhaldandi vera partur av grøna orkuskiftinum.

Karmarnir at velja umhvørvisrøtt akfør skulu gerast enn betri.

Vit vilja hava eina kommunu, sum verður rikin eftir nútímans virðum og hugburði, og sjálvandi skal kommunan vera umhvørvisgóð.

Tórshavnar Kommuna er kommunan, har lívið skal livast.

### Vælferð, mentan og trivnaður

Í kommununi skulu vit uppraðfesta allar tær tænastur, sum fær borgaran at støðast og trívast.

Tað skal vera trygt og gott at stovna familju í Tórshavnar Kommunu, og ongin skal halda seg aftur, tí mann eitt nú er stúrin fyri vøggustovuplássi ella tryggum gøtum at trilla barnavogn.

Harumframt skulu íbúðarmøguleikar vera til øll okkara ungu.

Stovnar og skúlar skulu hava kostrættar og kostnaðargóðar matarskipanir.

Okkara eldru skulu hava bestu karmarnar at njóta aldurdómin, og kommunan skal hava enn fleiri rekreativar møguleikar, sum øll frítt kunnu gagnnýta.

### Sterkur kommunubúskapur

Stórur partur av okkara hart vunnu pengum fer til kommununa. Tí er tað okkara skylda at tryggja, at pengarnir verða væl umsitnir.

Tí skal raksturin altíð vera skynsamur, við atliti til inntøkurnar hjá kommununi.

Málið er eisini, at Tórshavnar Kommuna skal vera besta staðið at reka vinnu.

Vit vilja skapa betri vinnukarmar fyri menning og vøkstur, og skipa ferða- og vinnuferðavinnu- møguleikarnar í kommununi.

Tað er ein vinn/vinnu-støða.



Annfinn Brekkstein



Geir Wardum



Arni Carlsen



Anita Heinesen



Bergun Kass



Petur Frank Holm



Halla Herdalur Poulsen



Jóhan Petur Johannesen



Ingvør Skaalum



Sunnvá Dahl Høgfeldt



Tummas Rubeksen



Maud Karbech Mouritsen



Pól Flosi Johansen

Sambandsflokkurin